

Hetta varð gjørt við gleði, og hátíðarlig var løtan, tá endað varð við føroyska tjóðsanginum. Aftan á drúgt og hendingaríkt kvøld, varð tikið í hondina á kekkum, takkað varð so hjartaliga fyri, og føroyska ferðalagið setti kós móti Prag. Við sær í hotellíbúðirnar høvdu føroyingarnir nakrar pappeskjur við køkum, sum blíðu kekkarnir endiliga vildu sleppa at geva okkum.

»Kórið hjá Jóhan« hevði tvær konsertir í Kekkia. Hin seinna konsertin var mikukvøldið 12. apríl í kirkjuni “Sankta Mortan í Múrinum” saman við einum øðrum kekkiskum kóri. Kirkjan, sum er avgomul – fyrsti parturin bygdur longu í 1100-talinum – liggur inni í miðbýnum í Prag. Spennandi var at vita, um nakrir áhoyrarar mundu fara at koma. Í Prag er ørgrynni av konsertum av øllum sløgum, so torført kann vera at fáa áhoyrarar til tær allar. Væl vísti seg tó at bera til. Kirkjan var so at siga fullsett við áhoyrarum, ið fagnaðu føroyingunum ófört. Kanska hjálpti tað væl, at danska sendistovan í Prag hevði tíðindini um konsertirnar inni á heimasíðu síni. Eisini hetta kórið fekk gávu frá føroyska kórinum, og føroyski kórleiðarin bar aftur fram røðu á kekkiskum.

Síðsta kvøldið í Prag fekk alt føroyska ferðalagið sær døgurða á sera stásiligari kekkiskari matstovu. Matstovan er í bygninginum “Obecni dum”, har kekkiska tjóðveldið varð kunngjørt í 1911. Framúr góður døgurði í áhugaverdum søguligum umhvørvi. Beint eftir døgurðan fekk Petur Jákupsson nápað sær eina harmoniku frá einum spælimanni á matstovuni, og skjótt trivu føroyingarnir í Niklas hjá Pena.

Hóast føroyskt veðurlag niðri í Prag settu føroyingarnir seg væl nøgdir innaftur í bussin seinnapartin fríggjadagin. Nú var steðgurin í Kekkia av, og kós sett móti Danmark. Koyrt varð alla náttina og út á morgunin. Um níggju tíðina kom ferðalagið til Hanstholm. Hjá teimum flestu mundi svøvnurin hava verið lítil, og tí var tað lívgandi at seta seg til borðs á sjómansheiminum og fáa sær ein góðan morgunmatarbita.

Veðrið var heldur ruskut heim við Norrønu, men kortini møttu allir kórsangararnir til páskasangløtuna í “Viking Club” seinnapartin páskadag. Páskaevangeliið varð lisið, kórið sang eina stutta skrá, og síðani var felagssangur – sálmar og sangir. Jórun hevði klaverfylgispælið.

Árla mánamorgunin komu troyttu, men kortini væl nøgdu, føroyingarnir aftur heim á klettarnar.



